Ársfrágreiðing skúlaárið 2018–2019

1. Skúlastýrið

Skúlastýrislimir

Valskeiðið hjá foreldraumboðunum í skúlastýrinum er tað sama sum hjá kommunustýrinum. Núverandi valskeið byrjaði 1. januar 2017 og varir 4 ár fram.

Foreldraumboð eru: Beinta Lisberg, Dánjal Petur Olsen og Dávid Renert Hansen.
Tiltaksumboð eru: Jóna á Rætt, Marsanna Tummasardottir, Finn Larsen og Randi Grunnveit Thomasen.
Kommunustýrisumboð eru: Trygvi Kallsoy og Hansina Jensen
Læraraumboð: Alis Højsted.
Skúlaleiðarin (skrivari): Sonni Djurhuus

Skúlastýrið hevur skipað seg við Beintu Lisberg sum formanni og Dávid Reinert Hansen sum næstformanni. Beinta Lisberg er í farloyvi og næstformaðurin er tí virkandi formaður og Jóna við Rætt er foreldraumboð.

2. *Virksemið hjá skúlastýrinum*

Virksemið hjá skúlastýrinum er skipað sambært Rundskriv um meginreglur fyri skúlastýri frá Mentamálaráðnum, dagfest 30. sep 2016, eins og eitt yvirlit frá Mentamálaráðnum, dagfest 30. sep 2016 sýnir heimildirnar hjá skúlastýrinum sambært Fólkaskúlalógini.

Uppgávurnar hjá skúlastýrinum fevna soleiðis um:

Sambært § 52, stk. 1 - 4

at hava eftirlit við virksemi skúlans

Eftirlitið verður framt á tann hátt, at skúlaleiðarin á hvørjum fundi kunnar um virksemi skúlans. Somuleiðis verða viðurskifti, sum foreldur gera vart við, tikin upp á fundi.

at taka avgerð um øll viðurskifti viðvíkjandi skúlanum, ið ikki eru løgd undir kommunustýrið, leiðara skúlans ella aðrar myndugleikar

Einki tílíkt mál hevur verið í hesum skúlaárinum.

at ummæla árligu fíggjarætlan skúlans

Fíggjarætlanin varð umrødd á fundi tann 12. sep 2018 og tann 14. nov 2018, har skúlastýrið legði dent á, at játtanin yvir tíð kemur øllum flokksstigum javnt til góðar.

Skúlastýrið hevur lagt dent á, at næmingar skulu ikki rinda fyri luttøku í tiltøkum, sum eru partur av skúlagongdini.

at leggja øll mál, sum bera fleiri útreiðslur við sær enn ásett í fíggjarætlanini, til góðkenningar hjá kommununi

Einki tílíkt mál hevur verið í hesum skúlaárinum.

at viðgera saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygging/umbygging

Skúlabyggingin , sum fer fram, er skipað undir eini bygginevnd. Skúlaleiðarin kunnar regluliga um hvussu arbeiðið fer fram.

at viðgera saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum.

Einki tílíkt mál hevur verið í hesum skúlaárinum.

Sambært § 53, stk. 1 - 6

at áseta meginreglur um:

1) undirvísingarætlan skúlans. Skúlaárið 2011/12 vóru nýggjar námsætlanir settar í gildi fyri fólkaskúlan. Námsætlanirnar avloysa í høvuðsheitum undirvísingarætlanirnar.

Ársætlanin hjá skúlanum varð gjøgnumgingin á fundi 12. sep 2018.

Ársætlanirnar vóru tøkar eina tíð á heimasíðu skúlans, so áhugaði kundu kunna seg um tær.

2) arbeiðsbýtið millum lærararnar og vikuætlanina. Henda ábyrgd er løgd til skúlaleiðaran, sum sbrt. § 55, stk. 3 stýrir og býtir arbeiðið millum teirra, sum starvast í skúlanum

Vikuætlanin verður umrødd fyri summarfrítíðina og verður løgd fyri skúlastýrið í september.

3) samarbeiðið millum heim og skúla.

Foreldrabólkar eru í fleiri av flokkunum.

4) fráboðan til heimini um úrtøku næminganna av undirvísingini

Meginreglur fyri fráboðan um úrtøku næmingana eru ikki gjørdar.

5) næmingafráverur

Meginreglur um næmingafráverur eru ikki gjørdar ella endurskoðaðar í hesum skúlaárinum

6) foreldrafundir, felagstiltøk fyri næmingar í skúlatíðini, setursskúla, starvspraktikk o. a.

Skipað var fyri jólahugna fyri foreldrum og onnur 5 dec 2018, har skúlastýrið tók sær av tí praktiska viðv. gløgg, holukøkum oø.

at ummæla øll mál viðvíkjandi skúlanum, sum kommunustýrið tekur avgerð um

Einki tílíkt mál hevur verið í hesum skúlaárinum.

hevur rætt til at ummæla øll mál, ið viðvíkja skúlanum

Einki tílíkt mál hevur verið í hesum skúlaárinum.

at ummæla øll mál, sum kommunustýrið og landsstýrismaðurin biðja um

Einki serstakt mál av hesum slag hevur verið í hesum skúlaárinum.

at góðkenna eftir tilmæli frá námsfrøðiliga ráðnum teir undirvísingarmiðlar, skúlin skal brúka, herímillum eisini teir, ið skulu vera í skúlabókasavninum

Undirvísingarmiðlarnir, sum skúlin eigur, verða nýttir.

at gera atferðarreglur skúlans og reglur um umsjónina við næmingunum í skúlatíðini við støði í ásettum reglum, sum landsstýrismaðurin hevur sett í gildi

Skúlin hevur skipanir viðvíkjandi

garðvakt

morgunløtu

flokstoymi

førleikastovu

fartelefonfrían skúla

starvsfólkahandbók

at samstarvar við onnur skúlastýri um at stimbra og menna skúlaskapin í økinum.

Einki tílíkt mál hevur verið í hesum skúlaárinum.

Starvssetanir

Skúlastýrið hevur lim í setanarnevndum í sambandi við at seta lærarar vm.

3. Virksemið hjá skúlanum

Næmingatal

Við skúlaársbyrjan vóru 215 næmingar í Skúlanum við Streymin.

Starvsfólk

Við skúlaársbyrjan vóru 21 lærarar, 2 námsfrøðingar, 2 stuðlar og 3 fastir vikarar við skúlan.

Skúlastýrið fyri Skúlan við Streymin

Oyrarbakki 14. mai 2019

Dávid Reinert Hansen
Dánjal Petur Olsen
Jóna á Rætt
Hansina Jensen

Trygvi Kallsoy
Alis Højsted
Sonni Djurhuus